# Sjónvarpsjournalistar fáa Cavlingvirðislønina

**Cavlingvirðislønin 2005 verður í dag handað tveimum journalistum fyri DR-dokumentarsendingina "Hævet over mistanke" um viðferðina, ein ungur drongur fekk í samband við handtøku. Drongurin doyði í politivarðhaldinum**

CAVLINGVIRÐISLØN

*Anna V Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fyrr í vikuni varð kunngjørt, at høgt metti journalistheiðurin, Cavlingvirðislønin, hesuferð verður latin sjónvarpsjournalistunum Michael Klint og Christian Andersen fyri dokumentarsendingina "Hævet over mistanke", sum varð send á DR1 í november í fjør.

Virðislønin verður handað í dag, og í grundgevingini sigur Calvlingnevndin millum annað:

- "Hævet over mistanke" er ein sjáldsama væl søgd sjónvarpssøga, sum vísir týdningin av kannandi og samfelagsviðkomandi journalistikki í eini tíð, har grunnar og lættisoppakendar sendingar seta dám á stóran part av sendiflatuni í donskum sjónvarpi.

**Rættartrygd í vanda**

"Hævet over mistanke" er framhald av sendingini "Under anklage". Hetta var fyrra sendingin Michael Klint og Christian Andresen gjørdu um málið, har ein 21 ára gamal drongur varð handtikin og stutt eftir doyði í politivarðhaldinum. Í sendingini dokumentera journalistarnir vantandi viljan hjá mynduleikunum at kanna málið til botns, hóast orsøkin til deyðstilburðin frá byrjan var sera ógreið.

Sendingin førdi til eina kanning, har ríkisákærin í Aalborg staðfesti, at ongin orsøk var at finnast at politinum í hesum sambandi. Eisini staðfesti Rættarlæknaráðið, at drongurin varð deyður av náttúrligum orsøkum. Teir báðir journalistarnir góðtóku tó ikki hesa niðurstøður, og í "Hævet over mistanke" lata teir høgt mettar útlendskar rættarlæknar meta um málið. Og eisini hesir sáa álvarsaman og vælgrundaðan iva um bæði deyðsorsøk eins og viðferðina av unga manninum í varðhaldinum.

Út frá óvanliga ítøkiligum dømum varpar sendingin soleiðis enn einaferð ljós á spurningin um, hvussu hóskandi tað er, at politiið kannar seg sjálvt í slíkum málum - og ivast harvið av álvara í rættartrygdini hjá borgaranum.

**Ímóti rákinum**

Sendingarnar hava vakt miklan ans og kjak í donskum fjølmiðlum og eru fyribils orsøkin til, at teir báðir Michael Klint og Christian Andersen nú fáa størsta danska journalistheiðurin yvirhøvur. Í hesum sambandi sigur Michael Klint við Ritzau

- Vit eru í einum ráki, har flestu sjónvarpssendingar royna at vera so undirhaldandi, sum gjørligt. Tí er tað ikki minst týdningarmikið, at sendingar, sum hesar, eisini verða gjørdar. Og so er tað fantastiskt at fáa eina virðisløn, sum tínir starvsfelagar eisini eru við til at lata. Tey hava hugt at søguni og sagt "Hetta er sannur journalistikkur".



*Cavlingvirðislønin verður í dag handað DR journalistunum Michael Klint og Christian Andersen fyri dokumentarsendingina "Hævet over mistanke"*

**FAKTA**

Cavlingvirðislønin kom í lag í 1944 í sambandi við 40 ára hátíðarhaldið hjá Dansk Journalistforbund og til minnis um stovnaran av felagnum, journalistin og rithøvundan, Henrik Cavling

Virðislønin verður hvørt ár latin einum ella fleiri journalistum, sum hava víst serlig evni óg áræði í undanfarna ári

Umframt eina standmynd av Henrik Cavling fylgja 20.000 kr við virðislønini

# Sambýli til sinnisveik í Sandavági tikið í nýtslu

**Í komandi viku verður sambýlið í Sandavági tikið í nýtslu. Húsini vórðu keypt í 2004, og eru tey nú liðugt umvæld og útbygd. Fýra fólk flyta inn í sambýlið í fyrstu syftu**

SAMBÝLI

- Enn eitt sambýli til sinnisveik verður tikið í nýtslu í komandi viku. Í hesum sambandi verður skipað fyri almennari móttøku, har sambýlið verður víst fram fyri almenninginum, og Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður fer at siga nøkur orð, sigur Almanna- og Heilsumálaráðið í tíðindas krivi.

Í desember 2004 keypti Almanna- og heilsumálaráðið eitt sambýli afturat til sinnisveik í Sandavági, sum nú er liðugt útbygt og umvælt. Sambýlið, ið liggur við Traðarvegin í Sandavági, liggur stutt frá hinum sambýlinum fyri sinnisveik, ið liggur undir Fobbakletti. Hetta gevur møguleika fyri at samskipa rakstur og virksemi á báðum sambýlunum. Tí er avgjørt, at Signa Andreassen, ið er leiðari fyri sambýlið undir Fobbakletti, eisini verður leiðari fyri sambýlinum, ið nú verður tikið í nýtslu.

Ein tílík samskipan av rakstri/virksemi hevur við sær størri møguleikar fyri smidligum og skilagóðum loysnum, við tað at møguleiki er fyri at samskipa náttarvakt, og at starvsfólkið kann skifta ímillum sambýlini við sjúku og feriu v.m., umframt at búfólkini eisini kunnu flyta ímillum, um tað verður neyðugt. Eisini kann verða skipað fyri felags tiltøkum fyri búfólkunum á báðum sambýlunum í Sandavági.

Sosialpsykiatriin, ið sambýlini eru partar av, er tann sosiala skipanin, ið hevur til endamáls at hjálpa teimum sálarsjúku við millum annað at forma gerandisdagin so innihaldsríkan sum gjørligt. Trupulleikin við verandi sambýli undir Fobbakletti er, at einki virksemisrúm er, ið gevur búfólkunum møguleika fyri samveru, virksemi og menning, ið verður mett sum ein týdningarmikil partur av sosialpsykiatriini. Húsini, ið nú verða tikin í nýtslu, hava ein kjallara, ið er yvir 150 m2, sum er innrættaður til virksemisrúm. Arbeiðið við at gera rúmið endaliga klárt og innrætta koma búfólkini á sambýlunum sjálvi at standa fyri. Á henda hátt kunnu tey sjálvi seta sín dám á virkisrúmið.

Í fyrstu syftu flyta fýra búfólk inn í sambýlið.

Móttøkan fyri almenninginum verður týsdagin 10. januar 2006, kl. 14.00. Øll eru hjartaliga vælkomin, sigur Almenna- og Heilsumálaráðið.

